Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hermann R. Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum

Evni: Asfaltering av Oyrarvegnum

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at raðfesta asfaltering av Oyrarvegnum í nærmastu framtíð?
2. Um ja, nær kann væntast, at arbeiðið verður framt?
3. Um nei, hvat ætlar landsstýrismaðurin annars at gera fyri at bøta um støðuna á hesum vegastrekki?

Viðmerkingar:
Oyrarvegurin er ein landsvegur við nógvari dagligari ferðslu, har tung vinnuakfør koyra regluliga. Vegurin er í ringum standi, og tað er tískil ein átrokandi tørvur á ábótum á hesum vegastrekkinum.

Henda farleið hevur stóran týdning fyri vinnulívið í økinum, men somuleiðis fyri borgararnar á Norðoyri, ið nýta vegin dagliga. Norðoyri er ein vaksandi bygd við einum vaksandi tali av barnafamiljum. Í nærmastu framtíð verður talan um tveir dagsstovnar í bygdini, og longu nú eru nógvar barnafamiljur, ið dagliga seta síni børn av har.

Samanumtikið er talan um ein landsveg, sum hevur ógviliga tunga og nógva ferðslu.

Á Løgtingi, 4. mai 2026

Hermann R. Samuelsen